# FLEIRI NÝGGJ FUGLASLØG VÓRU Í FØROYUM Í 2009,

## her umrøða vit 3 av teimum

Tekstur og myndir:

**Jens-Kjeld Jensen (JKJ)**
*jkjensen@olivant.fo*

**Hans Eli Sivertsen (HES)**
*hanseli@olivant.fo*

**SUMMARY**

Three new birds for the Faroe Islands were found by the authors in 2009: Subalpine Warbler *Sylvia cantillans*, Red-Rumped Swallow and Red-Flanked Bluetail *Tarsiger cyanurus*

Talgild myndatøka hevur vundið alt meira upp á seg seinnu árini, og tað sæst eisini aftur í hópinum av myndum, sum fólk taka. Við alnetinum ber eitt nú til hjá fólki at senda myndir til fuglafrøðingar, sum so í eini handavending kunnu avgera, um ein hevur fingið júst ta fuglamyndina, ein droymdi um.

Ein tann besti fuglafangarin í Føroyum má tó vera helgolandsrúsan hjá Náttúrugripasavninum í Nólsoy, ið nú sekstanda ár á rað hevur fangað mangan sjáldsaman gest.

Her skulu vit bert umrøða trý av teimum uml. 10 nýggju fuglasløgunum, ið á fyrsta sinni antin vórðu fangað ella fráboðað kring landið í 2009. Viðvíkjandi hinum fráboðanunum, mugu vit bíða eftir útsøgnunum frá danska „Sjældenhedsudvalget".

Tann 15. mai 2009 fór HES til Mykinesar til at taka myndir av lundum. Lunda sá hann ongan; men harafturímóti sá hann ein steggja av slagnum kinnhvítur ljómari *Sylvia cantillans*, sum ikki áður er sæddur í Føroyum.

Snimma á morgni 21. mai, fangaði og ringmerkti JKJ eina bøgu av sama slag í helgolandsrúsuni, og seinni sóust 3, 4, 5 og 6 fuglar her og har av hesum sama slagnum. Kinnhvítur ljómari finst í Suðurevropa og Norðurafrika.

Tann 17. mai sá Esbern í Eyðansstovu eina svalu, sum líktist frá hinum vanligu 30 svalunum í Mykinesi, og løtu seinni tók HES eina mynd av eini brandsvalu *Hirundo daurica*, sum ikki er sædd áður í Føroyum.

Tann 06. oktober 2009 var so aftur ein sera sjáldsamur gestur at síggja í helgolandsrúsuni í Nólsoy. Hesa ferð var talan um ein velbláa *Tarsiger cyanurus*, sum JKJ síðan ringmerkti. Tveir dagar seinni fangaði Troels E. Ortvad ein av sama slagi í Sumba.

Velblái finst heilt frá Finnlandi gjøgnum Russland og yvir til Japan. V

1


2


3


4


5


6


7


1 Kinnhvítur ljómari
*Sylvia cantillans*, steggi,
Mykines 15. mai 2009
HES

2 Kinnhvítur ljómari
*Sylvia cantillans*, bøga,
Nólsoy 21. mai 2009
JKJ

3 Kinnhvítur ljómari
*Sylvia cantillans*, bøga,
Nólsoy 21. mai 2009
JKJ

4 Brandsvala
*Hirundo daurica*,
Mykines 17. mai 2009
HES

5 Brandsvala
*Hirundo daurica*,
Mykines 17. mai 2009
HES

6 Velblái
*Tarsiger cyanurus*,
Nólsoy 8. oktober 2009
JKJ

7 Velblái
*Tarsiger cyanurus*,
Nólsoy 8. oktober 2009
JKJ